# Nú bíða teir eftir valinum



*Hilmar Høgenni, fulltrúi í Innlendismálaráðnum: – Uppgávan ikki nógv øðrvísi við einum valdømi*

**Uppgávurnar undan valinum eru av, og nú bíðar Innlendismáláráðið eftir valinum og valnevndin eftir fínteljingini**

VALFYRIREIKINGAR
*Jan Müller*

Hjá sentrala myndugleikanum eru fyrireikingarnar av til fyrsta valið, har Føroyar eru eitt valdømi. Innlendismálaráðið hevur gjørt sítt, og valnevndin hevur gjørt sítt. Valkvøldið fer Innlendismálaráðið saman við Kringvarpinum at taka ímóti valúrslitunum, og tá verður í fyrstu atløgu greitt, hvør verður valdur í nýggja Løgtingið.

Undan valinum hevur valnevnin havt tveir setningar, sum hon hevur avgreitt. Onnur er at taka ímóti valevnislistunum og at gjøgnumganga teir, og hin er at skipa fyri prentingini av atkvøðuseðlunum.

Valdagin eigur valnevndin onga uppgávu. Tá ið valið verður av, fer valnevndin at taka ímóti øllum valtilfarinum frá valstýrunum kring landið. Áður hava valnevndirnar kring landið skipað fyri fínteljingini. Hesar valnevndirnar eru ikki til longur. Nú er tað sentrala valnevndin, sum fer at skipa fyri fínteljingini.

- Vit fara undir fínteljingina so skjótt, sum tað ber til. Tað tekur tíð at fáa valbøkurnar og atkvøðuseðlarnar savnaðar, men vit rokna við, at fínteljingin verður liðug hósdagin í næstu viku, sigur Leivur Harryson, sum er formaður í fyrstu sentralu valnevndini til løgtingsval. Saman við honum í nevndini sita Bárður Larsen og Malan Johansen.

Í fínteljingini verður hvør einasti atkvøðuseðil vendur og snaraður. Serliga verður hugt at teimum atkvøðuseðlunum, sum valstýrini í fyrsta umfari hava valt ikki at telja við.

- Á valseðlinum skal bara verða settur ein krossur fyri eitt av valevnunum ella fyri einum av flokkunum. Um veljarin ger okkurt mistak, tá ið hann avgreiðir atkvøðugreiðsluna í einsemi í valboksini, so skal hann ikki royna at rætta mistakið á hesum valseðlinum. Heldur skal hann fara aftur til staðið, har hann fekk atkvøðuseðilin og biðja um at fáa annan atkvøðuseðil, sigur Leivur Harryson.

Fyri fyrstu ferð eru øll tey, sum bjóða seg fram at verða vald, á einum og sama atkvøðuseðli. Men tað hevur ikki borið við sær, at atkvøðuseðilin hesa ferð er serliga nógv størri í vavi, enn hann plagar at vera:

- Valevnini eru sett upp í tveir teigar. Tað ber við sær, at atkvøðuseðilin er eitt sindur breiðari, enn hann plagar at vera, og so er hann eitt vet longri. Í kunngerð í Sosialinum og Dimmalætting hava vit víst, hvussu seðilin sær út. Harvið ber tað til hjá veljarunum at kanna seðilin og fyrireika seg til valið, sigur formaðurin í valnevndini Leivur Harryson.

## Øll hava rætt at atkvøða

Í seinasta lagi, tá ið valhølini lata upp leygarmorgunin, skulu brævatkvøðurnar verða komnar valstýrunum í hendi.

Sjálvan valdagin ber tað til hjá teimum, sum ikki kenna seg at vera nóg væl fyri einsamøll at møta á valstaðnum og atkvøða í valrúminum, at greiða atkvøðu:

- Tað er ikki bara eitt ynski hjá veljaranum, men tað er ein rættur, sum allir veljarar hava, at teir kunnu atkvøða. Tey, sum ikki eru før fyri at fara inn í sjálvt valhøli, kunnu koma á valstaðið í bili, og so fer onkur frá valstýrinum út í bilin við atkvøðuseðlinum. Sjónveik, sum møta á valstaðnum, kunnu fáa onkran eftir egnum ynski við sær í valrúmið at hjálpa sær at seta krossin, men tað er ikki loyvt at leiðbeina fólki í, hvørjum tey skulu atkvøða fyri.

Valstýrið hevur ábyrgdina av, at alt gongur rætt fyri seg valdagin. Valdagurin byrjar á øllum valstøðunum við, at formaðurin vísir teimum, sum eru á staðnum, at kassarnir, har atkvøðurnar skulu leggjast í, er tómur. Síðani verður kassin læstur, og brævatkvøðurnar verða lagdar niður í. Kassin verður ikki latin upp aftur, fyrrenn valið er av, og øll hava valt. Tey seinastu, sum greiða atkvøðu, eftir at valstaðið hevur latið aftur, eru valstýrini, og tey, sum hjálpa til. Tá ið tað er gjørt, verður farið undir at telja upp.

## Øll eiga at hava valkort

Alt kunningararbeiðið í sambandi við valið hevur Innlendismálaráðið skipað fyri. Eitt nú at kunna um allar freistirnar, sum eru galdandi í sambandi við valið. Talan er um einar tredivu ymiskar freistir.

- Atkvøðuhølunum hava kommunurnar ábyrgdina av. Vit hava sent kommununum skriv við upplýsingum um, hvørjar teirra ábyrgdir eru, sigur Hilmar Høgenni fulltrúi í Innlendismálaráðnum. Hann heldur ikki, at uppgávan hjá Innlendismálaráðnum hesa ferð, nú Føroyar eru vornar eitt valdømi, hevur verið so nógv øðrvísi, enn hon hevur verið, tá ið landið hevur verið býtt sundur í sjey valdømir.

- Ein av uppgávunum hjá okkum hevur saman við Landsfólkayvirlitinum at skipa fyri vallistunum. Tað eru bara tey, sum standa á vallistunum, sum sambært ásetingunum kunnu velja. Tey, sum eru á listunum eiga í seinasta lagið hósdagin at hava fingið valkort. Um onkur ikki hevur fingið valkort, so eigur viðkomandi at seta seg í sambandi við kommununa fyri at fregnast, hvør orsøkin er og møguliga at fáa valkort, sigur Hilmar Høgenni.

## Loyniligt

Løgtingsvalið er loyniligt. Tað sigur lógin. Men spurningurin er, um tað er helt loyniligt, at talið av veljarum er heilt lágt.

- Á trimum av teimum 62 valstøðunum er talið av veljarum lægri enn 20. Tað er í Hattarvík, í Gásadali og í Mykinesi. Tað hevur ofta verið at hoyrt, at tað næstan ber til at rokna seg fram til, hvørjum veljararnir í hesum valstøðunum og kanska eisini á teimum, har veljaratalið er undir tredivu, atkvøða fyri, og tað hevur verið frammi, um atkvøðurnar í hesum støðum ikki átti at verið fluttar til annað valstað, áðrenn tær verða taldar. Men tað er ikki loyvt, vísir Hilmar Høgenni á.

- Valstýrið á øllum valstøðunum hevur ábyrgd av uppteljingini og harvið eisini av, at avstemmað soleiðis, at tað er samband ímillum atkvøðutalið, sum er sent til valstýrið og talið av brúktum og óbrúktum atkvøðuseðlunum, sum eru komnir frá Innlendismálaráðnum. Valið er loyniligt á tann hátt, at veljarin hevur ikki skyldu at upplýsa fyri nøkrum, hvørjum hann hevur atkvøtt fyri. Heldur ikki í rættinum.

Tað er væl hugsandi, at hetta verður síðsta ferðin, at tað verður talt upp á smæstu valstøðunum. Í uppskotinum um broytingar í lógini, sum lá í tinginum, tá ið valið varð útskrivað, varð lagt upp til, at tað skal bera til at flyta atkvøður.

